KJAK

Komedia og tragedia um eina skinflugu



Heri Mohr

Á Portal.fo 20. í farna mánaði lósu vit um eina harmiliga hending, ein sjúklingur, Ansgar Hansen, hevði upplivað á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn.

Serlækni á Landssjúkrahúsinum hevði eftir galdandi reglum fyriskipað AH serviðgerð á Ríkishospitalinum, og viðgerðin gekk eftir øllum at døma væl. Men av tí at AH ikki slapp heim til Føroyar tann dagin, sum ætlað, varð tað neyðugt at broyta ferðaseðilin samsvarandi, og tað fór at kosta honum nakrar túsund krónur eyka! Kjak og hóttan aftur og fram tyktist at loysa fløkjuna. Tað er sera óheppið, at slíkt, sum AH skrivar um, kann fara fram eitt nú, tá ið flúgvingin verður darvað av vánaligum floglíkindum. Sjálvandi eiga kunngjørdar reglugerðir um slíkt at vera galdandi.

Uttan upp á nakran hátt at blanda meg, mugu vit ikki gloyma, at Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn, sum verður fíggjað av Føroya løgtingi, verður umsitið av stjóra og starvsfólki við starvsreglum og øðrum reglugerðum, sum skulu haldast.

Lesarabrævið hjá AH gevur orsøk til nakrar hugleiðingar um Ríkishospitalið og øðrum tí viðvíkjandi.

Sum limir í tí danska kongaríkinum fáa vit føroyingar ókeypis sjúkrarøkt á Ríkishospitalinum. Í mong ár rindaði danska innanríkismálaráðið hospitalinum allar rokningarnar fyri serlæknaviðgerð og uppihald á hospitalinum. Hendan mannagongdin broyttist í 1988.

Í 1987 setti landsstýrið/ríkisumboðið eina "blokknevnd," (undirritaði var limur í hesari nevnd), sum skuldi gera fyrireikingar til at broyta verandi refusiónsskipan millum ríkiskassan og landskassan. Hetta innibar, at statskassans lógarbundnu útreiðslur í Føroyum – við nøkrum undantøkum – skuldu fíggjast við einum ríkiskassablokki umsitin av løgtinginum/landsstýrinum sum ein integrerandi partur av inntøkunum í løgtingsins fíggjarlóg. Hetta varð gjørt í fullari semju millum ta donsku stjórnina, landsstýrið, fólkatingið og løgtingið. Blokkurin varð oyramerktur til: Almannamál, heilsumál, skúlamál, maskinskúlan og fiskirannsókn. Nágreiniligar sundurliðingar, specifikatiónir, vórðu gjørdar fyri at vísa, hvussu blokkurin skuldi brúkast.

Av tí at Ríkishospitalið sum sagt fekk sínar rokningar goldnar beinleiðis av innanríkismálaráðnum, varð hetta broytt soleiðis, at hendan fíggingin til Ríkishospitalið eins og helvtin av rakstrarútreiðslunum hjá okkara trimum sjúkrahúsum var millum tað nógva, sum skuldi skipast í ein ríkiskassablokk. Í løgtingsins fíggjarlóg 1988 var so heildarveiting (ríkiskassablokkur) § 8: 480 milliónir. Og undir Heilsumál § 12: Ríkishospitalið 22 milliónir.

Uppihald á Sjúklingahospitalinum Tórshavn í Keypmannahavn hevur einki við blokkin at gera, tí tað er føroysk ogn og verður fíggjað av løgtinginum.

Heimastýrið skuldi ráða frítt yvir ríkiskassablokkinum samsvarandi nevndu nágreiniligu sundurliðing. Hetta skal skiljast soleiðis, at higartil galdandi donsk grannskoðan av økjunum, sum skuldu í blokk, helt uppat. Landsgrannskoðarin (løgtingsins decisiónsnevnd) skuldi nú ansa eftir, at blokkurin ikki varð brúktur til annað enn tað, ið hann sambært lógum og semjum var ætlaður til.

Umleggingin frá refusión til blokkskipan for fram í tveimum stigum: 1. januar 1988 fóru heilsumál, skúlamál, maskinskúlin og fiskirannsókn í blokk, og 1. juli 1993 fóru almannamál (pensiónir v.m. og serforsorg o.a.) eisini í 1988-blokkin. Í avtaluni um blokkskipan, undirskrivað av Poul Schlüter, forsætisráðharra, og Atla Dam, løgmanni, 20. mars 1987, er millum annað tilskilað, at "Endelig fastlæggelse beror på opgørelse af udgifterne vedrørende indlæggelser på Rigshospitalet."

Í 1998, tá ið loysingarlandsstýrið fekk stjórnarræðið, vóru 37,5 milliónir í blokkinum oyramerktar til Ríkishospitalið, og blokkurin var tá 922,6 milliónir. Meðan loysingarlandsstýrið ráddi fyri borgum 1998-2001, øktist ríkiskassablokkurin til 981,9 milliónir.

Gevið gætur: í árunum 1988 til 1998 var samsvar ár um ár millum løgtingsins játtan til Ríkishospitalið og upphæddina til sama endamál í ríkiskassablokkinum.

Men so fingu vit sum sagt loysingarlandsstýrið 1998-2001, sum varð sitandi til 2003, og tá broyttist nógv:

Í einum bóklingi 2000 undirskrivað av floksformonnunum, sum myndaðu landsstýrið, fingu allir føroyingar, úti og heima, at vita:

– "Í ár 2000 verður minni enn ein triðingur av tí danska stuðulinum brúktur í samfelagnum. Restin fer til samansparing, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd."

– "Sum er senda sjúkrahúsini í Føroyum sjúklingar til Danmarkar í sambandi við ymiskar serviðgerðir..... Hetta eru ikki tænastur, sum føroyingar fáa ókeypis. Føroysku sjúkrahúsini rinda fullan prís fyri bæði uppihald og viðgerð. Tí verður neyvan nøkur broyting á hesum øki."

Heilaspuni, møsn. Úti í Tinganesi "gloymdu" tey at greiða Føroya fólki frá, at fíggingin til serviðgerðir á Ríkishospitalinum og nøkrum øðrum sjúkrahúsum í Danmark verða 100% fíggjað úr ríkiskassablokkinum.

Líka mikið um tað eru fólkavaldir politikarar, ella landsstjórn ella Palleba og Marsanna,ið lúgva: lygnin er altíð ótespilig. Og tá ið kollektivar politiskar lygnir við stuðli frá almennum fjølmiðlum gera um seg, er tað mentala umhvørvið hjá fólki í viðkomandi landi í vanda.

Men tað, sum hendi í 2000, var bara ouverturan til óhugnan, sum gjørdist veruleiki eitt á seinni, 1. januar 2002. Tá varð ríkiskassablokkurin stungin djúpt, næstan svævaður, og stutt tíð gekk, áðrenn hann lá í fíggjarligum andaleypi: 366,4 milliónir tveittar á bláman og restin, ein amputeraður blokkur, varð bundin niður sum seyður. Hendan óbótagerð móti Føroya fólki varð framd við tveimum laserprintum undirskrivað av hvør sínum landsstýrismanni – uttan parafering og eingin journalisering – stytsta dagin í 2001.

Í nevndu brøvum er millum annað tilskilað: Dronning Ingrids Menighedsbørnehave, Færøernes Børnehjem, Klaksvig Tekniske Skole, Thorshavns Tekniske Skole, Færøernes Handelsskole overdrages vederlagsfrit til Færøernes hjemmestyre.

Vorðið sum jólagáva. Vónandi gloymdi løgmaður ikki at takka statsministaranum Føroya fólks vegna.

Um hesir týdningarmiklu bygningar í okkara skúla- og almannaverki veruliga gjørdust føroysk ogn, er ilt at siga, tí teir eru ikki skrásettir í ognaryvirlitinum í landskassans ársroknskapum. Kanska hava teir ongan góðan havt í 12 ár?

At landskassin við brestin misti 366,4 milliónir árliga av fíggingini til løgtingsins fíggjarlóg, mátti sjálvandi fáa sera álvarsligar avleiðingar. Vit mugu ikki gloyma, at landsstýrið/løgtingið ikki útvegaði landskassanum aðrar, nýggjar inntøkur í staðin fyri milliónirnar, ið vórðu tveittar á bláman. Sum frá leið noyddist løgtingið útvega landskassanum nýggjar inntøkur, sum bøttu nakað um peningatørvin; men ikki nóg mikið. Ein annars peningaliga tryggur landskassi hevur nú í fleiri ár ikki verið førur fyri at rinda lógbundnar útreiðslur uttan við lántøkum.

Skilaloysið í landskassanum1985-1992 við methøgari milliardaskuld og húsagangi tyktist ikki at vera lærupeningur hjá ábyrgdarleysum, nationalistiskum politikarum.

Nakrir politikarar, ið áttu sín part av hesi ógerð móti fólki og landi okkara, virka framhaldandi í landspolitikki. Eitt nú var núverandi landsstýrismaður við heilsumálum landsstýrismaður við fíggjarmálum, tá ið hann í 2001 skerdi ríkisblokkin við 366,4 milliónum og stongdi fyri dýrtíðarviðgerð av teimum 630 milliónunum, sum vóru eftir í blokkinum til heilsuverkið og almannaverkið. Hann ætlaði sær eisini at skerja blokkin við 117 milliónum til serforsorgina. Men tað varð av ongum. Lás- og lyklakríggj uppstóð í Tinganesi, og sápubløran brast.

Í sjónleikinum hjá Henrik Ibsen *En Folkefiende* sigur tann djarvi Doktor Stockmann eina staðni: *Ja, det ville være en underfundighet, – et bedrageri, en løgn, en likefrem forbrytelse imot almenheten, imot hele samfundet!*

Min fremstilling er så slående sann og riktig, det vet jeg.

Tað var heppið, at landspolitikarar í Danmark og Føroyum vórðu samdir um, at ríkiskassauppsparingin hjá Sjúkrakassagrunninum, 28 milliónir, skuldu brúkast til grannsking.

Í tí árliga ríkiskassablokkinum eru p.t. einar 22 milliónir oyramerktar til heilsuverkið/sjúkrakassar. Tað er nærliggjandi at hugsa, nú sjúkrakassarnir eru farnir í søguna, at Heilsuverkið við Fróðskaparsetrinum og Granskingargrunninum – og vónandi viti og skili – fara at ráða yvir nøkrum av hesum nógvu milliónunum og annars ansa eftir, at "ørskapurin 2001" ikki endurtekur seg.

Í 1960unum og 80unum fór fram risastór um- og útbygging av sjúkrahúsverkinum í Føroyum. Øll trý sjúkrahúsini: Landssjúkrahúsið og eitt nýtt "Statssjúkrahús," Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús vóru út- og umbygd av nýggjum. Hetta varð alt fíggjað soleiðis, at ríkiskassin og landskassin rindaðu hvør sína helvt av øllum kostnaðinum. Løgtingið útvegaði landskassans helvt við lánum úr ríkiskassanum yvir 25 ár, minnist meg rætt.

Fyri bert fáum árum síðani brúkti landskassin 4-500 milliónir til stóra um- og útbygging av Landssjúkrahúsinum.

3 sjúkrahús í Føroyum, sum landskassin og ríkiskassin fíggja við helvtarbýti umframt eitt Ríkisahospital við ókeypis serlæknaviðgerð og Hotel Tórshavn í Keypmannahavn til sjúk og avvarðandi. Hóast alt hetta so hoyrist, at eitt nýtt sjúkrahús skal byggjast í Sandagerði á trøðni millum Landssjúkrahúsið og tann gamla Próstagarðin. Hevur Tórshavnar býráð givið loyvi til framhaldandi burturbeining av grønum økjum í okkara høvuðsstaði? Og hevur løgtingið játtað pening til slíka yvirdádigheit?

Men Gud náði okkum: Í farnu viku frættu vit, at Landssjúkrahúsið skyldar serlæknum 13 milliónir í ógoldnum lønum! Hvat verður tað næsta úr skrelliposanum? At tað føroyska sjúkrahúsverkið fer undir administratión?

Um vit um eitt ár ella so fáa eina politiska samgongu a la hana í 1989, og 285 milliónir til heilsuverkið og 117 milliónir til serforsorgina og 215 milliónir til pensiónir alt í ríkiskassablokkinum verða tveittar á bláman – handalagið er óivað enn í lagi – verður ein uttanvelta, juridisk administratión eitt fait accompli fyri aðru ferð í 23 ár.

Og so tey ungu. Meðan tey í hesum døgum áhaldandi fáa potað í oyrini og eyguni, at tey "elska" og "velja" Føroyar, verða tey kanska um skamma tíð stavnsbundin, tí tað skal verða bíligari og betri hjá ungum lesandi ikki at lesa í Danmark.

Í øldir hava vit føroyingar nomið føroyska/ europeiska mentan (kultur) í og úr Danmark. Nógv av okkara sermerktu mentamonnum og -kvinnum hava i longri ella styttri tíð lisið og búð í Danmark: V. U. Hammershaimb, Nicolai Mohr, Svabo, Jakob Jakobsen, Rasmus Effersøe, Fríðrik Petersen, Gudmund Bruun, Niels Winther, Chr. Bærentsen, Chr. Matras, Regin Dahl, Jørgen-Frantz Jacobsen,Tróndur Olsen, Maria Mikkelsen, Ruth Smith, Janus Øssursson, Mikines, Janus Djurhuus, og nógv onnur. Símun av Skarði og Rasmus á Háskúlanum hittust av tilvild á Askov háskúla í Danmark. Andbornir á hesum skúla og Vallekilde háskúla og eggjaðir av Ludvig Schrøder og Jacob Appel og Ernst Trier gjørdist dreymurin um ein føroyskan fólkaháskúla veruleiki. Jóannes Patursson, sum í 16 ár var eins nógv í Danmark sum í Føroyum, yrkti tann vakra sangin um Danmark Eg veit eitt land við lagi eftir M. S. Viðstein.

Her nevndu eru øll farin undir grønu torvu.

Stutt eftir seinna heimsbardaga (1939-1945) – fólkaatkvøðan 1946 var farin aftur um bak – hittust nakrir lesandi føroyingar, kanska tíggju, í einum heimi í Keypmannahavn. Gott, gamalt føroyskt kjak – turr grind við spiki og eplum og øl – um ta politisku støðuna í Føroyum. Eingin orðstýrari. Tað var tó ein, sum næstan ikki luttók í kjakinum; hann sat avslappaður og lurtaði við grindabita í hondini. Spurdur, hvat hann helt um alt hetta, svaraði hann: "Nei, je veit ikki; je kenni mín begrensning." Hann var úr Vági og gjørdist landsrættardómari í Danmark.

Tað var Dánial Nolsøe við tí virðiliga smædni, sum er eyðkennandi fyri okkum í Føroyum. Nú eitt eyðkenni við andaneyð.

———

Einaferð var tað ein stór skinfluga. Allar hinar skinflugurnar kallaðu hana Vanity, tí hon helt seg vera vakrari og klókari og størri og sterkari enn allar hinar skinflugurnar. Ein dagin viltist hon í einum myrkum kjallara og kom inn í eitt nátthús, har ein apa loysti sær buksurnar. Skinflugan gjørdist øgiliga kløkk og bilsin, tá ið hon hoyrdi apuna frata. Ta ið apan hevði gjørt seg lidnan og var farin úr tí myrka kjallaranum, setti skinflugan seg, har apan hevði sitið, tí hon vildi apa seg eftir apuni og larma eins hart sum apan. Tað skuldi hon ongantíð hava gjørt, tí hon fór í fillur við brakinum og hvarv í bukkuni. Allar skinflugurnar, sum frættu, at Vanity var horvin, fóru í hjallin at verpa víggj í nýflettum og í nýgreipaðum á seiðatrænum undir hjalsvegginum.

P.s. Í Sosialinum nr. 12 hevur Rógvi Nybo, stud.scient.pol eina tíðargrein, sum eitur Komið og verið meira saman. Hetta er ein so vælskrivað og góð grein, at øll, ung og gomul, eiga at lesa hana við umhugsni.

HM